# SUNI STÝRIR **HEIMSINS** BESTU METRO

STARVIÐ ER **FERÐSLULEIÐARI** Í HEIMSINS BESTU **METRO**. UPPGÁVAN ER AT **SYRGJA** FYRI, AT **142.000** FERÐANDI KOMA **TRYGT** AFTUR OG FRAM **HVØNN** DAG. TRYGD ER EISINI **LYKLAORÐIÐ** Á ARBEIÐSPLÁSSINUM, HAR TEY **JAVNAN** ERU VITNI TIL **HERVERK**, HARÐSKAP, STULDUR OG EISINI **BUMBUHÓTTANIR**. SOSIALURIN HEVUR HITT **SUNA SKYLV REINERT** Í **KEYPMANNAHAVN**, SUM UPPLIVIR MEIRA ENN TEY **FLESTU** Í SÍNUM **GERANDISDEGI**



**SAMRØÐA**
Rólant Waag Dam
rolant@sosialurin.fo

Hann var ein náttarravnur burtur av, Suni Skylv Reinert. Sum leiðari í Club 20 og Café Natúr, Rio Bravo og Cleopatra, var hann ein býarkongur í Havn, ið sá minni til dagsins ljós enn flestu føroyingar gera.

Suni Skylv Reinert flutti til Danmarkar í 1993, men eisini í danska høvuðsstaðnum hevur hann gjørt sítt til, at býurin ikki sovnar. Saman við tveimum øðrum rak hann nevniliga dansistaðið Jacques, sum frá fyrsta degi varð nógv vitjað av føroyingum. Seinni broyttu teir konseptið á dansistaðnum, soleiðis teir í størri mun fingu fatur á donsku fjøldini, áðrenn tey løgdu á heilt annan bógv og skipaðu Jacques sum eitt stað, har samkynd savnaðust til gleði og gleim um vikuskiftið. Hesa tíðina, sum diskotekseigari í Føroyum og síðani Danmark, var Suni Skylv Reinert vitni til eina rúgvu av ógvusligum og skemtiligum hendingum.

### Náttarlív á øðrvísi hátt

Tann dag í dag upplivir Suni framvegis meira enn tey flestu á sínum arbeiðsplássi. Hetta hóast tíðin sum náttklubbaeigari er eitt farið kapittul, og hann nú starvast sum ferðsluleiðari í metro í Keypmannahavn.

– Vit hava skiftandi vaktir, so eg arbeiði framvegis um næturnar viðhvørt. Stóri munurin er bara, at fyrr sá eg fólkini, meðan tey vóru í býnum. Nú síggi eg tey bara á veg í og heim frá býnum, flennir Suni, sum hevur sæð mangt og hvat á sjónbandatólunum, sum standa á metrostøðunum

– Tað eru ikki bara full fólk, vit síggja og flenna eftir. Tað eru eisini fólk, ið eru á veg heim úr býnum og sum gera tað, tey ikki kundu bíða við, til tey komu heim. Bæði í sjálvum tokunum og á støðunum kring í býnum. Farna vikuskiftið, sunnumorgunin, var eitt par í gongd mitt á Nørreport støðini, greiðir Suni frá og ristir við høvdinum.

Á arbeiðsplássinum úti á Amagar hava teir eitt ótal av sjónvarpsskermum, sum beinleiðis vísa tað, ið hendir á teimum 22 metrostøðunum í býnum. Tilsamans eru 250 upptøkutól, sum vísa alt tað, tú bæði kanst og ikki kanst ímynda tær.

– Nakin fólk, fólk í batmanklæðum og jólamenn. Tað er heilt ótrúligt, hvat fólk finna upp á í gerandisdegnum, flennir Suni.

Men upptøkutólini eru ikki sett upp fyri at undirhalda starvsfólkunum á metromiðstøðini á Amager. Tey eru nevniliga til stóra hjálp, um eitt nú ein alarmur fer í gongd á eini støð. Tað kann vera ein roykalarmur, at okkurt er á sporunum, sum órógvar ella okkurt heilt triðja.

### Heimsins besta metro

Við upptøkutólunum kunnu teir skjótt staðfesta hvør trupulleikin er og hvussu hann skal loysast. Eru trupulleikar, steðga metrotokini. Avbjóðingin er tí, at hava tokini í gongd alla tíðina.

Hetta er ein uppgáva, Suni og starvsfelagar hansara taka í størsta álvara. Síðani metroin niðri varð tikin í nýtslu í 2002, hevur fólk verið til arbeiðis hvønn einasta minutt. Og tey stívliga 230 fólkini, sum starvast í metroini í Keypmannahavn syrgja í felag fyri, at 98 prosent av fráferðunum eru rættstundis. Úrslitið fær valla verið betri enn tað sama. Hetta hava tey eisini varnast aðrastaðni, tí metroin í Keypmannahavn er kosin heimsins besta metro tvær ferðir, seinast í 2010, umframt eisini at hava fingið heiðurin sum besta metroin í Evropa.

> *Tað hendir seg, tíverri, viðhvørt, at bumbuhóttanir koma. Tá er tað løgreglan, sum hevur fingið frænir av onkrum og berir okkum boðini víðari*

### Vaktin byrjar dagin fyri

Á metromiðstøðini úti á Amager arbeiða tey í vaktum. Hevur Suni náttarvakt, so er svøvnrútman sjálvandi øðrvísi enn hjá fólkum flest og hetta skal kroppurin innstilla seg uppá. Tí byrja fyrireikingarnar til næsta arbeiðsdagin ofta dagin fyri. Og av tí, at trygdin er í hásæti, er tað einki sum eitur at gera ein býtúr kvøldið fyri, tú skalt til arbeiðis.

– 0,0 alkohol í blóðinum er eitt krav. Faktiskt er alkohol bannað á øllum matriklinum. Kemur tú til arbeiðis í bili, mást tú tryggja tær, at tú ikki hevur eina fløsku av vín ella ein kassa av øl liggjandi aftanfyri. Sjálvt tað er ▶